## Fosturpápin kært neyðtøkudómin

39 ára gamli maðurin, sum fyri viku síðani varð dømdur hálvtannað ára fongsulsrevsing, fyri at hava neyðtikið og at hava framt annan grovan kynsligan ágang móti fosturdóttir síni, hevur kært dómin.
Tað var hósdagin í farnu viku, at maðurin varð dømdur fyri brot á fýra greinar í revsilógini – vanliga neyðtøku, aðra enn vanliga neyðtøku, neyðtøku framda ímóti barni undir 15 ár og neyðtøku av barni, sum tú hevur ábyrgd av.
Upprunaliga noktaði maðurin seg sekan, men tá dómurin fall tók hann við honum. Nú hevur maðurin, sum framvegis situr varðhaldsfongslaður, kortini kært dómin, sum so skal fyri landsrættin.




## Seldi hassj og amfetamin

Seinnapartin í gjár dømdi Føroya Rættur ein mann fyrst í tjúgunum 14 daga hefti.
Tað var tann 14. august í 2006, at ungi maðurin varð tikin. Tá hevði hann 6 gramm av hassj, 2,63 gramm av hassjmix, 2,5 gramm av amfetamin og eina vekt uppi á sær.
Maðurin var eisini skuldsettur fyri, at undan hesum at hava selt 30 gramm av hassj til átta ymisar keyparar. Í rættinum í gjár mintist hann ikki, hvørjir hesir keypararnir vóru, men hann játtaði seg sekar í báðum ákærunum.
Maðurin fekk 14 hefti fyri hetta, og hann tók við dóminum. Hetta er fimta ferðin síðani 2004, at maðurin fær ein dóm í Føroya Rætti.
Eftir skránni átti eitt annað rúsevnismál verið fyri í gjár, men tað er útsett til 13. februar.

# Alfred krýpur til krossin

**Alfred Olsen, sum fyri jól boðaði frá, at hann tók seg úr samgonguni, er á veg innaftur í samgonguna**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í gjár sat Sambandsflokkurin á við Alfred Olsen, tingmann floksins í Eysturoynni, sum fyri jól boðaði frá, at hann tók stuðul sín frá samgonguni, av tí at ov nógvir samgongulimir atkvøddu fyri broytingini í grein 266b, sum gevur teimum samkyndu innivist í revsilógarparagraffini.

Sambært keldum hevur Kaj Leo Johannesen, floksformaður, givið honum kravboð um at koma aftur í samgonguhitan. Um hann ikki gjørdi tað, so hevði hann mist teir nevndarsessir, sum tillutaðir vórðu Sambandsflokkinum undir seinastu samráðingum.

Vælvitandi keldur vilja vera við, at Alfred Olsen nú krýpur til krossin og aftur fer at stuðla samgonguni.

# Sambandsfólk tosa altíð væl saman

**Tað sigur Alfred Olsen í stuttari viðtalu, tá vit ringdu til sambandsmannin fyri at spyrja, um hann farin upp í aftur samgonguna ella ikki. Hann vísir til tíðindaskriv, sum kemur út í kvøld og sigur, at tann avgerðin, sum stendur í har, er hann ikki kroystur til at taka**

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Stutt fyri døgurða í dag, ringdu vit til Alfred Olsen fyri at finna út av, um hann endaliga hevur tikið seg úr samgonguni, ella um hann er kropin til krossin og farin upp í aftur.

Vit ynsktu at fáa greiði á, hvørja avgerð hann hevur tikið. Ein avgerð, sum varð tikin á tíðliga seinnapartin í gjár, men sum almenningurin framvegis einki kennir til. Ein avgerð, sum allir sambandsveljarar bíða spentir eftir, ein avgerð, sum allir politiskt áhugaðir føroyingar bíða eftir, og ein avgerð, sum øll tann politiska skipanin má hava svar upp á fyri at kunna virka víðari.

Men øll hesi sleppa at bíða nakað enn, tí Alfred Olsen vil ikki gera nakra viðmerking, fyrr enn eitt tíðindaskriv frá honum er komið út.

– Eg sendi eitt tíðindaskriv út seinni í dag, og har fáa tit alt at vita, sigur Alfred Olsen, tá vit fáa orðið á hann umvegis telefonina. Tíðindaskrivið við fráboðanini kemur helst einaferð í kvøld, og fyrr enn tað tí hevur sambandstinglimurin onga viðmerking.

**Ikki kroystur**

Við Portalin í gjár segði formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, soleiðis:

– Vit hava funnið eina loysn eftir eitt drúgt talv, segði Kaj Leo Johannesen tá, men vildi ikki koma nærri inn á hvør loysnin var.



Vit spyrja tí Alfred Olsen, um hann hevur verið kroystur til at taka eina avgerð nú?

– Ein løgtingsmaður verður ongantíð kroystur til nakra avgerð, sigur hann.

Men hava tú, Kaj Leo og Sambandsflokkurin tosað væl saman í hesum málinum?

– Sambandsfólk tosa altíð væl saman, sigur Alfred Olsen, sum ikki ynskir at gera aðrar viðmerkingar fyrr enn tíðindaskrivið er komið út í kvøld.

# Trúvirði ikki skatt

**Kaj Leo Johannesen hevur onga meining um, hvørt tað er rímiligt at lata sambandsveljarar bíða so leingi eftir avgerðini hjá Alfred Olsen. Prátið millum hann og Alfred Olsen hevur verið konstruktivt, sigur Kaj Leo Johannesen, sum ikki heldur at trúvirði floksins hevur tikið skaða**

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



– Nei, tað havi eg onga meining um, svarar Kaj Leo Johannesen, tá vit ringja til formann Sambandsfloksins og spyrja, um tað er rímiligt at lata sambandsveljarar bíða til í kvøld eftir eini avgerð, sum varð tikin seinnapartin í gjár.

– Nú er tað gingið so leingi, so nakrir tímar frá ella til, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann vil ikki koma inn á, hvørja avgerð partamaður hansara hevur tikið.

Men hvussu hevur prátið verið millum teg, Alfred og Sambandsflokkin verið í málinum?

– Konstruktivt, er stutta og greiða svarið hjá Kaj Leo Johannesen. Hann vísir á, at tey í flokkinum hava tosað um tingini og sigur so, at í politikki tekur alt tí.

Men metir tú, at flokkurin hevur tikið skaða av hesum?

– Flokkurin og tann politikkur, vit føra broytist ikki av hesum. Okkara støða í mun til ríkisfelagsskapin er hin sama, og vit eru framvegis ein borgarligur flokkur, sigur Kaj Leo Johannesen.

Men hvussu við trúvirði floksins?

– Trúvirði hevur ikki tikið skaða meti eg.

**Flokkurin framum persónar**

Veljarakanningin, sum Dimmalætting kunngjørdi í gjár vísti, at Sambandsflokkurin fær 22,1 prosent av atkvøðunum. Hetta er ein rímiliga stór afturgongd í mun til tey 26,8 prosentini, sum flokkurin fekk í veljarakanningini, sum Dimmalætting gjørdi í desembermánaði.

Kaj Leo Johannesen heldur tó ikki, at veljarakanningin vísir, at hetta málið hevur skatt flokkin.

– Í mun til seinasta løgtingsval, er hetta ein afturgongd upp á 1,6 prosent. Tann afturgongdin hevur møguliga samanhang við órógvin, sum hevur verið í flokkinum. Men kanningin vísir eisini, at hesi prosentini ikki eru farin í annan flokk. Tey mugu vit so arbeiða fyri at fáa aftur, og helst nøkur aftrat eisini, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann heldur ikki, at vit nú kunnu tosa um eina afturgongd hjá flokkinum. Tað fáa vit svar upp á komandi val, heldur hann. Kaj Leo Johannesen vísir síðani á, at beint undan seinasta løgtingsvali spáddi veljarakanning, at Sambandsflokkurin fór at fáa 29 prosent, men tá valið so var, fekk flokkurin "bert" 23,7 prosent, so tað er so ymiskt hvat veljarakanningar siga.

– Ofta verður sagt, at tað kostar at sita í samgongu, men tað hevur tað so ikki gjørt hjá okkum, sigur Kaj Leo Johannesen. Veljarakanningin hjá Dimmalætting og Gallup sigur nevniliga, at Sambandsflokkurin framvegis er størsti samgonguflokkurin, og tað fegnast formaður floksins um.

– Vit hava ein stóran flokk og eg haldi tað koyrir væl í flokkinum. Tað er flokkurin og politikkurin framum persónarnar, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann sigur, at tað sum er hent í teirra flokki við Alfred Olsen, er tað sum kemur fyri í politikki.

– Hetta fáa vit ikki forða fyri, og í Tjóðveldisflokkinum fór jú ein maður í flokkinum, sigur Kaj Leo Johannesen.